LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 71/2019 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Sirið Stenberg, løgtingsmanni um fyribyrgjan av, at koronasmitta kemur inn í landið.**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Er ætlanin at kanna fólk fyri koronusmittu, tá ið tey koma til Føroyar ?
2. Hvussu ætlar landsstýrið annars at fyribyrgja, at smitta kemur inn í landið ?

**Svar**
**Til 1:**

Politiski myndugleikin er sinnaður at kanna fólk fyri koronasmittu, tá ið tey koma til landið, men heilsufakliga verður hetta ikki mett at vera ráðiligt. Higartil hevur politiski myndugleikin valt at fylgja ráðgevingini hjá heilsumyndugleikunum í hesum spurningi.

Grundgevingin hjá heilsufakliga myndugleikanum er, at ein einstok kanning gevur bara eina lotumynd. Er kanningarúrslitið negativt, kann ikki útihýsast, at viðkomandi er smittaður kortini. Slíkar kanningar kunnu tí geva ein falskan tryggleika, ið aftur kann hava við sær, at viðkomandi fær ov sinniligan hugburð til tilmælini um sóttarhald.

**Til 2:**

Landsstýrið heitir staðiliga á útlendsk ferðafólk um ikki at koma til Føroyar – í fyrsta lagi til tann 30. juni. Mælt verður framhaldandi til, at ferðandi til Føroya fara í sóttarhald í 14 dagar. Samstundis verða mannagongdirnar herdar við enn neyvari at fylgja við og minna fólk á at halda tilmælið um sóttarhald. Um tað gerst neyðugt, er landsstýrið til reiðar at útvega sær heimild at seta reglur um tvungið sóttarhald í verk.

Í Tinganesi, 1. mai 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo